# Oddaliðið í Vestmanna

**Megna hoyvíkingar at taka alt í Vestmanna, so fer av álvara at síggja ljóst út við ætlanunum um eina FM-finalu. Men VÍF hevur illa ráð at missa nakað**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað líkist einum veruligum braki, tá H71 sunnudagin fer til Vestmanna. Verjandi meistararnir hava kanska ikki svingað heilt so væl í ár, men enn eru teir væl og virðiliga við í stríðnum um annað av finaluplássunum, og tí møguleikanum hava teir lítlan hug at sleppa.

Mótstøðuliðið sunnudagin eru tó ikki hvørjir sum helst. Sum aktuelt oddalið á stigatalvuni mugu hoyvíkingar væl metast at hava sterkasta liðið í landinum. Og at teir í mun til sigurin á Kyndli nú aftur hava Jakob Jónsson og Trónd Vatnhamar við í hópinum, man ikki gera støðuna verri.

Slíkan spenning, sum hoyvíkingar nú uppliva í FM-stríðnum, hava teir neyvan vita um síðani 1999, og tí er einki at ivast í, at nógvir hoyvíkingar taka hóast alt stutta biltúrin til Vestmanna sunnudagin.

Ein sunnudagur, sum kanska kann staðfesta, at H71 er meira enn bara ein døgnfluga á hondbóltstindinum.

Í hinum báðum dystunum sunnudagin skulu ávíkavist Kyndil og StÍF hvør í sínum lagi halda lív í sínum ætlanum um ein finalusess. Kyndil eigur hesaferð heimavøll móti bláu grannunum, sum á pappírinum hava eitt væl veikari lið enn Kyndil.

Tað sama má eisini sigast at vera galdandi á Skála, har StÍF eru stórfavorittar móti vitjandi kollfirðingunum. Ikki minst, um hugsað verður um avrikið hjá skerda StÍF-liðnum, sum mikukvøldið vann greiðan sigur á Kyndli.




*Í grundspælinum vunnu VÍF og H71 hvør sín sínamillum dyst, og tí er spenningurin stórur undan fyrra dystinum í endaspælinum*

# Mjølnir kann skapa spenningin

Stóri flogbóltsdysturin hetta vikuskiftið verður uttan iva tann í Havn, har Mjølnir kemur á vitjan hjá Fleyr.

Fleyr hevur fyri tað nógva verið mest sum einaráðandi í vetur, men Mjølnir er eitt av liðunum, sum á einum góðum degi veruliga kunnu hótta Fleyr. Og megna teir at taka stigini við sær úr Havn, so verður spenningur av álvara blástur aftur í FM-stríðið. Spenningur, sum eisini SÍ hevur verið við til at skapt, tá teir í seinasta umfarinum av grundspælinum bastu havnarmonnunum.

Í hinum mansdystinum hetta vikuskiftið tekur SÍ ímóti ÍF, og á pappírinum er tað ikki ein dystur, sum skuldi givið sørvingunum nakrar serligar trupulleikar.

Hjá kvinnunum skal oddaliðið, Dráttur, á heimavølli taka móti Mjølni, sum ikki hevur verið so væl fyri í ár. Liðið hjá Mjølnir telur tó fleiri heilt sterkar spælarar, og fáa hesar blandingina við yngru kreftunum at rigga, so kunnu tær væl og virðiliga koma at arga ovaru liðini nakað.

Hin dysturin verður í Hoyvíkarhøllini, tá KÍF longu leygardagin tekur ímóti TB. Tvørakvinnur hava í ár tapt at kalla allar lykladystirnar í landskappingini, men skulu tær sveiggja seg nakað upp í endaspælinum, so skal tað vera júst nú, at hetta skal henda. Hinvegin kann KÍF við einum sigri eisini seta seg í góða støðu, nú endaspælið er farið ígongd.

**-mørk**

# Seinni finalisturin skal finnast

**SÍ og Mjølnir fara leygardagin at dystast um seinasta plássið í steypafinaluni**

FLOGBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Í meistaradeildini hjá monnum hevur Fleyr vunnið bæði Fleyrkappingina og Mjølnirkappingina. Tað hevur við sær, at tapandi liðini, SÍ og Mjølnir skulu dystast um seinna finaluplássið. Tann dysturin verður leygardag kl. 15.00 í Gundadalshøllini.

Bæði Mjølnir og SÍ hava mangan roynt seg í steypafinaluni, og tað er einki at ivast í, at bæði liðini fara at gera alt fyri at røkka finaluplássinum.

Í landskappingini hava hesi bæði liðini givið Fleyr størstu kappingina, men tað er bara SÍ, sum hevur megnað at vunnið á Fleyr.

Tað gjørdu teir í síðsta landskappingardystinum fyri jólasteðgin.

SÍ og Mjølnir hava leikt tveir dystir ímóti hvørjum øðrum í landskappingini. SÍ vann tann fyrra í Klaksvík 3-1 og Mjølnir tann seinna í Sørvági 3-1. Sostatt standa liðini púra jøvn undan dystinum leygardagin.

Fleyr hevur bara eina ferð verið í steypafinaluni. Tann finalan var ímóti Mjølni, og hóast Fleyr tað árið vann allar sínar landskappingardystir og gjørdist føroyameistari, so vann Mjølnir steypafinaluna.

Líka mikið um Mjølnir ella SÍ vinnur dystin leygardagin, so kunnu vit vænta okkum finalubrak í høllini á Hálsi leygardagin 18. februar.

# Dupult brak millum oddaliðini

**Stjørnan og VB hittast tvær ferðir hetta vikuskiftið. Eina ferð í Coca Cola-kappingini og eina ferð í Sunset-kappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan verður um sett dupultbrak millum VB og Stjørnuna hetta vikuskiftið.

Liðini bæði vórðu drigin móti hvørjum øðrum í hálvfinalunum í Coca Cola-kappingini, og fyrri av hesum dystum skuldi ætlandi spælast mikukvøldið. Men væl vitandi um, at tað kann vera trupult at ferðast úr enda í annan av landinum í miðviku, fingu feløgini loyvi at flyta hendan dystin til leygardagin. Fyrra hálvfinalan skal spælast í Vági, og tí verður tað her, at liðini hittast leygardagin. Hetta í einum dysti, har Stjørnan kanska er evarska lítil favorittar, tó at tær eru fullgreiðar um, at VB so sanniliga eisini hevur ætlanir um eitt pláss í steypafinaluni.

## Lættari finaluleið

Leygarkvøldið fara liðini bæði umborð á Smyril, og sunnudagin er tað so KÍ-høllin, sum er karmur um nýggjan dyst millum liðini. Hesa ferð er tað oddasessurin í Sunset-kappingini, sum stendur upp á spæl, og tann dysturin er tí minst líka týdningarmikil fyri liðini bæði. Ikki so nógv tí FM-heitið stendur og fellur við hesum. Men vinnarin av teirri uppgerðini stendur við einum munandi betri møguleika at spæla seg í FM-finaluna. Hetta tí ovasta liðið í endaspælinum spælir móti tí niðasta, tá hálvfinalurnar verða settar saman.

Hin dysturin í FM-endaspælinum í Sunset-kappingini er í Havn, har grannarnir báðir, Kyndil og Neistin takast. Á pappírinum er lítið at ivast í, at Neistin er stórfavorittur at vinna dystin. Hinvegin, so fekk Kyndil mikukvøldið sjón fyri søgn um, at Neistin heilt avgjørt er til at tosa við. Og tí er einki at ivast í, at tær fegnar vilja sleppa at arga tær bláu eitt sindur.

## StÍF í Vestmanna

Í niðara bólkinum verða somuleiðis tveir dystir á skránni. Mest spennandi av hesum er kanska tann í Vestmanna, har StÍF kemur á vitjan. VÍF varð undan jólum roknað sum klárt sterkasta liðið í niðara endaspælinum, men avrikini hjá StÍF seinastu dystirnar av grundspælinum bendu tó á annan bógv. Og hálvfinalan móti Neistanum mikukvøldið vísti eisini, at framgongd á liðnum er stór.

Hin dysturin verður millum Søljuna og Tjaldur. Tjaldur eigur enn fyrsta stigið á árinum til góðar, men móti VÍF seinast vístu tær av álvara tenn, og so er spurningurin, hvørt tær veruliga fara at bíta frá sær sunnudagin.


"Tað eru tíni val, Harry, sum gera okkum tað, sum vit eru"
Dumbledore
(úr Harry Potter)



## Barnsburðaravloysari til Telebúðina í Miðvági

**Søkt verður eftir hálvtíðar barnsburðaravloysara til Telebúðina í Miðvági at byrja sum skjótast.**

**Til starvið ynskja vit eitt fólk við:**
- handils- og førleikaroyndum í kundaavgreiðslu og handilsskapi
- royndum at selja fjarskiftisútgerð ella aðra tøkni og teldur
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- kunnleika til enskt
- vilja at hjálpa, har tað er neyðugt
- evnum at arbeiða og avgreiða mál skjótt
- viðkomandi útbúgving

Telebúðin í Miðvági er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið galdandi fyri Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Høgna Vilhelmsen ella Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Starvið verður at seta sum skjótast og umsóknir skulu vera Starvsfólkadeildini á Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 18. januar 2006.

**Føroya Tele**
**Starvsfólkadeildin**
**Postrúm 27**
**110 Tórshavn**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Í FT Samskifti starvast 105 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.